Nýggja Landssjúkrahúsið:

# Sleppa at flyta inn heystið 2003

**Fríggjadagin var reisigildi í nýggja sjúkrahúsbygninginum við síðuna av Landssjúkrahúsinum. Nú er komið so langt við byggiarbeiðinum, at bygningurin er innilokaður, og nú er farið undir at seta skilaveggirnar upp**



*Fríggjadagin var reisigildi í nýggja sjúkrahúsbygninginum. Nú er bygningurin innilokaður og farið verður nú í gongd við at tekja og annað.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

BYGGIARBEIÐI
*Ingrid Bjarnastein*

Høvuðsbygningurin á Landssjúkrahúsinum er nú innilokaður. Og nú er farið í gongd við at seta skilaveggirnar upp og eisini er farið í holt við at fáa isolatiónsarbeiðið gjørt.

– Fyrst og fremst er tað hitaanleggið, sum verður sett upp. Nú arbeiða vit við teknikk bygninginum við síðuna av, har lyft og trappur og ymiskt tekniskt er. Millumbygningurin er eisini í gerð, og nú fara vit undir at tekja og gera framsíðurnar uttan, sigur Kristian Rasmussen, byggiformaður.

Eftir ætlan verður alt byggiarbeiðið liðugt 1. juli 2003, og higartil heldur tíðarætlanin væl. Tá so liðugt er at byggja, skal øll útgerðin inn og hølini skulu møblerast.

– Hetta kemur helst at taka restina av árinum, men vit ætla, at tey á Landssjúkrahúsinum skulu sleppa at flyta stigvíst inn, so tey fyrstu sleppa, um alt gongur eftir ætlan, helst inn á heystið 2003. Annars sleppa hini at flyta inn fyrst í 2004, sigur Kristian Rasmussen.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi. Vátakava- ella kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini okkurt kavaælið og hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin hækkar hann upp í landnyrðing. Avfall, partvís kavi og hitin millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur, men sunnudagin snarar hann í landsynning og kavi. Hitalagið millum ÷3 og +1 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷21 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | ÷11 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | 7 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | ÷5 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | – |
| Madrid | 7 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 17 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 968 hPa. við Hvarvið fer eysturefter og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudagin.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer eystureftir og dregur framvegis kalda luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/03 kl. 06⁰⁰– 05/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,1°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 04/03 kl. 06⁰⁰– 05/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 13,1 mm

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

## VESTFALLSKYRRINDI

27. februar: Mánin næstur jørðini
6. mars: Seinna kvarter
14. mars: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. mar | 00.11 | 12.50 | 11.50 | — | - | 12.05 | 02.11 | 14.50 | 03.11 | 15.50 | 11.05 | 23.45 | 10.05 | 22.45 | 00.26 | 13.05 | 01.26 | 14.05 | — | 12.35 | 01.11 | 13.50 |
| 7. mar | 01.30 | 14.10 | 00.30 | 13.10 | 00.45 | 13.25 | 03.30 | 16.10 | 04.30 | 17.10 | — | 12.25 | 11.25 | 23.50 | 01.45 | 14.25 | 02.45 | 15.25 | 01.15 | 13.55 | 02.30 | 15.10 |
| 8. mar | 02.35 | 15.01 | 01.35 | 14.01 | 01.50 | 14.16 | 04.35 | 17.01 | 05.35 | 18.01 | 00.50 | 13.16 | — | 12.16 | 02.50 | 15.16 | 03.50 | 16.16 | 02.20 | 14.46 | 03.35 | 16.01 |
| 9. mar | 03.26 | 15.51 | 02.26 | 14.51 | 02.41 | 15.06 | 05.26 | 17.51 | 06.26 | 18.51 | 01.41 | 14.06 | 00.41 | 13.06 | 03.41 | 16.06 | 04.41 | 17.06 | 03.11 | 15.36 | 04.26 | 16.51 |

5 707265 100036 >